# Kjak



**Elsebeth Gunnleygsdóttir Hansen**
*mercedis@klaksvik.fo*

# Sálarfrøðingur setast hjá Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum

Í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011, samtykti Klaksvíkar Býráð einmælt, eftir tilmæli frá Sosialu Nevnd, at sálarfrøðingur skal setast í starv hjá Barnaverndartænastuni á Sosialu Deild.

Tey seinnu nógvu árini hevur Barnaverndartænastan brúkt munandi upphæddir til sálarfrøðiliga viðgerð, og vanlig siðvenja hevur verið, at henda tænasta verður keypt frá privatum sálarfrøðingum.

Tær fyribyrgjandi fyriskipaninar, ið Barnaverndartænastan oftast setur í verk, eru sálarfrøðislig viðgerð og familjuviðgerð. Í nógvum førum hevur Barnaverndartænastan tørv á sálarfrøðisligari hjálp bæði til børn og familjur teirra.

## Eitt framstig fyri økið

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, forkvinna í Sosialu Nevnd, upplýsir fyri heimasíðuni, at eitt samt býráð hevur nú tikið avgerð um, at seta ein sálarfrøðing í fast starv í sjálvum økinum til at taka sær av pørtum av hesum tænastum.

– Barnaverndartænastan metir, at tað er tørvur á einum sálarfrøðingi á Sosialu Deild. Okkara royndir vísa, at vit á henda hátt fáa gagnnýtt sálarfrøðingin betri, til frama fyri familjurnar og dygdina í arbeiðinum, upplýsir forkvinnan í Sosialu Nevnd.

– Fíggjarliga er stórt sæð talan um eina útreiðsluneutrala loysn, tí starvið verður fíggjað av tí játtan, sum í dag er sett av og verður brúkt til keyp av uttanhýsis tænastum til Barnaverndartænastuna.

– Eg fegnist saman við øllum býráðnum um hetta stóra framstig á sosiala økinum, ið hevur so stóran týdning fyri trivnaðin her í kommununi, sigur forkvinnan í Sosialu Nevnd.

Starvið sum sálarfrøðingur á Barnaverndartænastuni á Sosialu Deild verður lýst leyst í januar mánað 2011.

Selja bilin?
– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo




Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00

Av misgáum er skeivur prísur komin á pipar- og saltkvørnina í Mánaðarblaðnum, sum kemur út mánadagin 6. desember. Rætti prísurin er her. Vit biðja um umbering fyri mistakið.
Sosialurin




Pipar og salt
Grand Cru
kr. 299,95

Rætting til lýsing í Mánaðarblaðnum

Thomas Dam búnýti